# Skeiv kvinna

Læknarnir á størsta sjúkrahúsinum í Norðurevropa, Sahlgrenska Universitetssjukehuset í Götaborg ásanna í samrøðu við Aftonbladet, at teir hava gjørt eitt syrgiligt mistak. Ein 50 ára gomul kvinna kom til regluliga kanning á sjúkrahúsinum, men av einari ella aðrari orsøk vórðu royndir hennara blandaðar saman við royndirnar av einari aðrari kvinnu. Tað gjørdi, at læknarnir tóku annað bróstið hjá henni, sjálvt um tað var frískt.

# Samráðast um svartkjaftin

Hósdagin og fríggjadagin verður fundast um, hvussu fiskiskapurin eftir svartkjafti skal skipast í 2007. Talan er um fyrsta regluliga fundin, síðani strandarlondini – t.e. Føroyar, ES, Ísland og Noreg – komu ásamt um heildarkvotu og býti millum londini. Høvuðsendamálið við fundinum í ár veðrr eftirmeta skipanini fyri umsiting av svartkjaftastovninum. Ein skipan, sum millum annað inniber, at heildarkvotan skal minka við í minsta lagi 100 tonsum um árið frá 2007 at rokna.

# Bók um Jóan Petur hjá Mouritsi

**Nú kemur út bók um tann kenda rokskiparan Jóan Petur hjá Mouritsi. Rithøvundur er Absalon Absalonsen, og útgevari er forlagið Løkur Lítli, sum høvundurin sjálvur eigur**

BÓKAÚTGÁVA

Jóan Petur hjá Mouritsi varð føddur í Vági 1894. Stillisliga livdi hann, og stillisliga legði hann árarnar inn undir Vesturgrønlandi í 1963 í koyggjuni á seinasta skipinum, hann førdi.

Í bókini verður sagt frá um smádreingin, sum lærarin einki væntaði sær av, men sum longu 12 ára gamal sýndi manndómsmót og áræði og tók teir vaksnu á bóli.

Sum unglingi var hann sera ágrýtin. Hann var altíð millum teir bestu ella bestur at fiska á skipi í sjálvdrátti. Sum skipari var hann altíð millum teir fremstu, og hann veiddi ta størstu nøgdina, nakað føroyskt snørisskip fekk eftir einum ári.



Hann var bara 22 ár, tá hann fyrstu ferð førdi skip. Tað várið vórðu teir niðurskotnir á Bankanum, men manningin varð bjargað á undursaman hátt. Øll tey 12 skipini, sum tá vórðu søkt við Føroyar eftir einum samdøgri, verða umrødd í bókini, og nógvir av monnunum, ið vóru við, eru nevndir

Sum sjómaður megnaði Jóan Petur fleiri ferðir tað, sum fyri øðrum kann tykjast ógjørligt, ikki minst seinnu ferðina hann upplivdi, at skipið fór til botns. Eisini ta ferðina varð øll manningin bjargað undir ógvuliga torførum umstøðum..

Sera áhugavert er at lesa um henda sáttliga og lítillátaða mannin, sum ongan háva gjørdi um seg sjálvan, men sum ikki duldi, at eina ódnarnátt í havsneyð á Suðurlandinum upplivdi hann tað besta, honum nakrantíð var fyri, tá tann livandi Gud og Kristi fullgjørda verk á krossinum gjørdust hansara álit í einum og øllum.

Sagt verður frá mongum sjáldsomum og áhugaverdum hendingum, og nógvir



persónar verða umrøddir. Stórur partur av okkara siglingar- og vinnulívssøgu verður lýstur, eisini við nógvum myndum. Sumt av tí hevur sjálvandi serligt tilknýti til Vágsbygd, har ein mongd av fólki úr øllum landinum vóru í vinnu um ta tíðina.

Hópur av áhugaverdum veiðutølum eru tikin við. 734 persónar og 155 skip og bátar eru nevnd. Høvuðspersónurin er Jóan Petur, men ein partur í bókini er um Dánjal hjá Mouritsi, og ein annar er um Mourits hjá Jóan Peturi. Tað setur sín dám á bókina, at høvundurin hevur kent teir tríggjar og hevur sjálvur verið sjómaður í 52 ár og siglir enn.

Bókin, ið ber heitið »Jóan Petur hjá Mouritsi«, er 386 blaðsíður. Hon verður gjørd hjá Einars Prent og verður í bókabúðunum um hálvan novembur. Kostnaðurin verður 360 kr, men hon kann tó bíleggjast frá útgevaranum fyri 300 kr.

# Fólkatal í Suðuroy 1801 – 1911

TÍÐINDASKRIV

Í 1999 gav Torgir Strøm í Porkeri út bøkurnar *Fólk í Suðuroy 1584–1840.* Hetta var tilfar, sum Johan O. Samuelsen, sjómansskúlalærari, hevði savnað úr kirkjubókum, tingbókum, pantiprotokollum, jarðarbókum, kongsbókini og fólkateljingum, og sum Torgir skrivaði inn á teldu og síðani gav út. Hetta er vælegnað tilfar hjá ættargranskarum.

Torgir hevur nú í fleiri ár skrivað fólkateljingar í Suðuroy inn á teldu. Síðani hevur hann gjørt broytingar, rættingar og tillagingar til hesar fólkateljingar (tann fyrsta frá 1801 og seinasta frá 1911). Hetta *Fólkatal*, sum nú verður givið út, er soleiðis ein tillaging úr fólkateljingunum. Er okkurt komið skeivt fyri í fólkateljingunum, er hetta rættað. Nøvnini eru tey somu, men stavsetingin er ikki altíð tann sama sum í fólkateljingunum. Heitini eru føroysk, og í staðin fyri aldur á fólki er føðingardagur og ár skrivað. Ymsar broytingar eru gjørdar við uppseting soleiðis, at tann raðfylgjan, sum er í fólkateljingunum, ikki altíð er fylgd.

Bøkurnar hava fingið heitið *Fólkatal* fyri at gera mun á hesum bókum og beinleiðis avskrivaðum fólkateljingum. Hesar bøkur eru at meta sum eitt slag av framhaldi av bókunum Fólk í Suðuroy 1584-1840, serliga ætlaðar fólki, sum fáast við ættarkanning, men vónandi eisini til gleði fyri onnur áhugað.

**Í fjør komu 4 bøkur út í A4 stødd:**

Fólkatal fyri Sumba, Víkarbyrgi, Agrar og Lopra 96 síður
Fólkatal fyri Vág 80 síður
Fólkatal fyri Porkeri og Nes 71 síður og
Fólkatal fyri Hov og Fámjin 78 síður

**Í ár koma 3 bøkur út í A4 stødd, og tær eru:**

Fólkatalið fyri Trongisvág og Tvøroyri 111 síður
Fólkatalið fyri Sandvík, Froðba og Øravík 105 síður
Fólkatalið fyri Hvalba 103 síður

Bøkurnar fáast við at ringja á telefon nr. 315854, nr. 373176 ella nr. 223274 ella skriva teldupost til: pouhan@post.olivant.fo ella til: torgir@kallnet.fo. Bøkurnar fáast eisini í bókabúðunum.

# Skattalættin ikki bara borgarligur

**Løgmaður ásannaði, at tað eru ikki øll í flokkinum, sum eru eins fegin um skattalættan í samgonguskjalinum. Men hann heldur kortini, at skattalættin ikki er so borgarligur, sum fólk vilja vera við. Millum annað tí samgonguavtalan eisini gav eina hækkan til Samhaldsfasta**

LANDSFUNDUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt av evnunum, ið longu undan landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum fekk umrøðu, var skattalættin, sum er feldur í samgonguskjalið.

Fleiri vildu vera við, at talan var um borgarligan politikk, so tað forslær, tí skattalættin var mestur hjá høgu inntøkunum. Og onnur hildu tað vera skeivt, at eitt samgonguskjal verður orðað, har skattapolitikkurin verður fastlagdur fleiri ár fram í tíðina, hóast búskaparligu fortreytirnar ikki eru kendar, tá avtalan verður gjørd.

Og serliga hesum seinasta gav løgmaður – sum eisini er floksmaður – viðhald í á landsfundinum.

– Eg eri samdur við teimum, sum siga, at tað er ikki rætt at gera avtalu um eitt nú skattalætta fyri eitt fýra áraskeið, tí búskaparstøðan kann skjótt broytast, og tí skal ein skattalætti avtalast ár um ár. Eitt nú talar búskaparstøðan í dag ikki beinleiðis fyri skattalætta, tí upphitingin er stór, og vit hava undirskot á okkara handilsjavna.

Hinvegin er Jóannes Ejdesgaard ikki samdur í, at tað bert eru høgu lønirnar, sum hava fingið ágóðan av skattalættanum.

– Okkara progressivi skattastigi ger, at lágar inntøkur rinda lægri skattaprosent enn høgar inntøkur. Men ein rindar toppskatt av seinasta vunnu krónunum, tá árliga inntøkan fer upp um tað mark, sum er ásett fyri hægsta skattaprosent.

– Tað er eingin loyna, at ein vanlig arbeiðaraløn liggur sera tætt at markinum fyri føroyskan toppskatt og fer helst upp um uttan yvirtíðararbeiði. Velur arbeiðarin at arbeiða eitt sindur yvir, so verður øll yvirtíðin skattað við hægsta skattaprosenti. Og tað er júst hetta, sum skattalættarnir skulu broyta og hava broytt. Lønarvøksturin í sær sjálvum ger tað neyðugt at dagføra skattastigan, tí annars lækkar markið fyri toppskatti. Við skattalættanum fer at bera til hjá lág- og miðalinntøkum at arbeiða yvir uttan at gjalda toppskatt oman fyri 50%. Men hin vegin, so vil ein skattalætti til hesar bólkar altíð merkja, at eisini hægri inntøkur fáa sítt burturúr. Tað er innbygd í sjálva skipanina,

### Fingu eisini sítt

Og hartil vísti løgmaður eisini á, at Javnaðarflokkurin eisini fekk sín part, tá avtalan varð gjørd.

– Saman við hesari avtalu gjørdu vit eisini av, at arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin skuldi hækkast við einum fjórðingprosenti frá hvørjum parti hvørt árið tó við hálvum prosenti frá hvørjum parti komandi ár. Hetta hevur m.a. havt við sær, at Samhaldsfasti frá 1. januar næsta ár fer upp um 2.000 kr., um mánaðin. Tá fer ein stakur pensjonistur, sum ikki hevur aðrar inntøkur, at fáa góðar 9.000 kr. um mánaðin og ein hjún, bæði pensjonistar við ongum øðrum inntøkum, góðar 15.000 kr. um mánaðin. Vallyftið okkara var 10.000 kr. fyri tann staka og 16.000 kr. fyri hjúnini, segði løgmaður millum annað á landsfundinum um vikuskiftið.